# Hvar skalt tú í starvsvenjing?

**Í vikuni hava vit verið úti og vitjað ymsar næmingar í starvsvenjing. Vit spurdu hvussu teimum dámdu hetta arbeiðsplássið, ið tey hava valt at verið stavsfólk hjá, í tvær vikur**




*Jónvør S. Joensen, Tvøroyri, 16 ár & Marin í Dali, Trongisvági, 16 ár.*

Hvar? Løgreglustøðini.

Hví: Vit vildu vita meira um arbeiðsdagin hjá einum løgreglumanni.

Hvussu dámar tykkum: Tað er eitt gott arbeiðspláss.

Hvat sleppa tit at gera: Meira enn væntað. Fylgja við í øllum, sum teir gera, og royna okkum fram við ymsum.

Tað góða við starvsvenjingini: Tey gera nógv burturúr, og tú veitst ongantíð hvussu dagurin fer at síggja út.

Tað keðiliga: Summir dagar er lítið at gera, og ein kann koma út fyri onkrum, tær ikki dámar.

Er hetta nakað fyri teg: Jónvør, - Ja tað hevði væl kunna verið nakað fyri meg. Marin, - Ja, mær dámar væl at uppliva nakað, og tað ger man í hvørtfall hjá løgregluni.

Starvsfólkið: Tey eru sera blíð, og royna sum frægast at vit ikki koma at keða okkum.



*Jógvan Joensen, Fuglafjørður, 16 ár*

Hvar: Kaupthing.

Hví: Vildi læra um hvat tey arbeiða við.

Hvussu dámar tær: Ótrúliga væl.

Hvat hevur tú lært: Um partabøv, lánsbrøv o. a. slíkt.

Hvat sleppur tú at gera: Arbeiða við teldu og taka telefonina.

Tað góða við starvsvenjingini: Spennandi.

Tað keðiliga: Hevði viljað at arbeitt við kundum.

Er hetta nakað fyri teg: Nei, tað trúgvi eg ikki.

Starvsfólkið: Tey eru ógvuliga arbeiðssom og blíð.




*Turið Johannesen, Norðragøta, 16 ár.*

Hvar: Tórshavnar Býráð

Hví: Fyri at fáa at vita, hvussu tað er at stýra einari kommunu.

Hvussu dámar tær: Sera væl, tað er ógvuliga spennandi, læruríkt og fjølbroytt.

Hvat sleppur tú at gera: Eg havi gjørt faldarar, teknað spælipláss á einum skúlaøki við teldu. Verið á brandstøðini og annars verið við, tá okkurt hendir.

Tað góða við starvsvenjingini: Tað er stuttligt, læruríkt og spennandi. Onki er líka. Eg sleppi at ferðast nógv runt. Á brandstøðni er spennandi at vera, tí um okkurt óhapp hendir, má ein altíð vera til reiðar.

Tað keðiliga: Onkutíð kann eg keða meg, tí summar uppgávur eru bert til tey vaksnu, so kann eg ikki vera við, men soleiðis er óivað allastaðni.

Er hetta nakað fyri teg: Eg ivist, um tað er nakað fyri meg, men tað kundi verið. Hvør veit.

Starvsfólkið: Fólkini eru ótrúliga fitt at arbeiða saman við. Tey eru blíð og skemtingarsom.

Annað: Starvsvenjing er ógvuliga góð at hava, tí har fær man eina fatan av, hvussu tað er at arbeiða har í dagligdegnum. Man lærir nógv og gerst meira sjálvstøðugur.



*Aleksandra Rudy Michelsen, Froðba, 16 ár.*

Hvar: Djóralæknastovan.

Hví: Eg havi áhuga fyri djórum, og møguliga vil eg fáa mær útbúgving sum djóralækni.

Hvussu dámar tær: Sera væl.

Hvat hevur tú lært: Eg havi lært, hvussu djór verða viðgjørd, hví og hvat kann feila teimum, og um hvussu ein kann bøta um heilsuna hjá djórunum.

Tað góða við starvsvenjingini: Eg sleppi at gera nakað, ið eg elski - at arbeiða við djórum. Og at tað er eitt ógvuliga fjølbroytt arbeiði.

Tað keðiliga: Tað kundi verið meiri fjølbroytt yvirfyri hvørji djór koma her.

Er hetta nakað fyri teg: Ja, tað vil eg siga.

Starvsfólkið: Lars, hann er sera fittur og lívligur.

Annað: Hetta er veruliga nakað sum eg kann gera restina av mínum lívi, nú eg longu havi fingið innlit í starvið.




*Sissal R. Næs, Hvalba, 16 ár & Maria Dalsá Olsen, Kambsdalur, 15 ár*

Hvar: Matas

Hví: Vit eru áhugaðar í kosmetik.

Hvussu dámar tykkum: Okkum dámar tað væl.

Hvat sleppa tit at gera: Taka fyri, seta vøru upp á pláss, pussa hillar o.a.

Tað góða við starvsvenjingini: At vit sleppa at gera tað sama sum øll hini starvsfólkini gera.

Tað keðiliga: Til tíðir er lítið at gera.

Er hetta nakað fyri tykkum: Ja.

Starvsfólk: Tær eru fínar, ógvuliga fittar.

Annað: Starvsvenjing er góð. Man kann finna útav, hvat man vil í framtíðini.



*Harda Emma Skoradal, Norðragøta, 16 ár.*

Hvar: SVF

Hví: Vildi royna okkurt spennandi og fjølbroytt

Hvussu dámar tær: Mær dámar øtiliga væl.

Hvat sleppur tú at gera: Eg síggi, hvussu tey taka upp og seta saman, og hvussu t. d. tey seta Fres studio upp.

Tað góða við starvsvenjingini: At eg ikki allatíðina geri tað sama.

Tað keðiliga: Tað er í grundini onki keðiligt.

Er hetta nakað fyri teg: Ja, møguliga.

Starvsfólk: Tey eru altíð í góðum lag. Tey eru blíð og skemta nógv, og tey duga væl at hava meg við í øllum sum tey gera.

Annað: Tit ungu, veljið SVF! Tað er framtíðin! hehe

**STARVSVENJING**

*Navn: Mariann Mikkjalsdóttir/Elsa Maria Højgaard Hansen/Katrina Eyðunsdóttir Hansen*




*Sigrid Hammershaimb Nielsen, Fámjin, 16 ár.*

Hvar: Yndi Fitness

Hví: Til stuttleikar og eg vildi royna nakað nýtt

Hvussu dámar tær: Tað er fínt at vera her.

Hvat sleppur tú at gera: Alt tað eg vil.

Tað góða við starvsvenjingini: Eg sleppi sjálv at venja, og síggja allir teir lekkru sjeikarnir sum venja her.

Tað keðiliga: At vaska maskinurnar.

Er hetta nakað fyri teg: Nei, tað rokni eg ikki við.

Starvsfólk: Tey eru ótrúliga fitt.